gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Tillukku VB

## *Oddagrein*

LOKSINS eydnaðist tað einum av okkara elstu fótbóltsfeløgum, Vágs Bóltfelag ella betri kent sum VB, at vinna føroyskameistaraheitið í fótbólti í bestu deildini. Hetta er stórfingna og gullrandaða føðingardagsgávan, sum spælarar, venjarar og hjálparfólk hjá liðnum, nú kunnu lata sínum egna felag í gávu á 95 ára degnum. Vakrari og betri gávu kundi heimbygdin ikki fingið á hesum stóra degi.

TAÐ er so ikki uttan stríð, strev og sveitta, at 1. deildarliðið hjá VB hevur vunnið sær sæti í gullstólinum í kappingini í ár. Liðið hevur vunnið eitt uppiborið meistaraskap.

NEYVAN nakrantíð í føroyskari fótbóltssøgu hava so mong ynskt so nógv gott fyri so fá, sum henda dagin, tá VB skuldi standa sína seinastu styrkiroynd: at vinna á B36, sum fyri bert eini viku síðani vann erkafíggindanum HB neisir. Tað er ikki ov nógv sagt, at nærum allar Føroyar krossaðu fingrar fyri VB, vágbingum og Vági henda dagin. Hóast øll eru sær sjálvum næst í fótbóltskappingum, so átti VB heiðurspoláss í mongum hjørtum henda seinasta leikdagin í landskappingini.

TAÐ vildi eisini verið ótrúliga spell, um hesin so týðandi søguligi og psykologiski sigurin glapp vágbingum av hondum á sjálvari málstrikuni avgerandi dagin, nú liðið hevði spælt seg fram til oddasessin. Men tað vildi so til, at VB-spælararnir eisini henda dagin vístu gott spæl og vóru sera málsøkjandi. Men B36 spældi eins væl henda dagin, og tað var um reppið, at B36 handaði erkafíggindanum í Havn, HB sigurin. Úrslitið 2-1 til VB var uppiborið. Tann besti vinnur, og soleiðis var eisini henda dagin. VB vann sína fyrstu fótbóltslandskapping nakrantíð við manér. Vit ynskja teimum tillukku.

Á sama hátt sum landsliðið fær sjóvað okkum føroyingar saman sum fólk og gevur samleikanum ítøkiligt innihald, so fær 1. deildarliðið hjá VB sjóvað saman vágbingar í heimbygdini og runt um landið alt og fær givið samleikanum at vera vágbingur innihald. Eftir mongu brotasjógvarnar í 90-unum, har nettupp Vágs bygd mundi vera tað plássið í landinum, sum var ringast rakt, kemur ein slíkur sigur - um enn tað bara er eitt spæl - sera væl við. Hann fløvar. Hann gevur sjálvsálit. Hann er við til at styrkja og menna aftur trúnna uppá - ikki bara tað at vera vágbingur - men eisini at framtíð er í heimbygdini, framtíð er í at skapa lív og livilíkindi fyri komandi ættarliðum á hesum plássinum hóast mongu bakkøstini.

EIN kann kanska loyva sær at siga, at ein slíkur sigur psykologiskt er nógv meira verdur enn bæði nýggjur Smyril og útlitið fyri nýggjum vinnuvirkjum og harvið er hann eitt vælkomið lot í seglini á tí útjaðaraskútu, sum politikarar siga seg hava lagt kjølin til. Peningur og stórar ætlanir eru avgerandi fyri framburði og vøkstri, men eisini tey menniskjansligu virðini, sum vit eru felags um, hava so sanniliga eisini stóran týdning. Og hvat hevur størri menniskjansligt virði í Vági í hesum døgum enn júst heimliga fótbóltsliðið! Enn einaferð vágbingar og Vágs bygd - hjartaliga tillukku.

***Sosialurin***

# Springaraboð við Flesjarnar

Tað er eftir øllum at døma nógv grind við Føroyar fyri tíðina. Fríggjadagin fekk løgreglan boð um, at ein stórur flokkur av springarum var sæddur við flesjarnar.

- Tað eydnaðist kortini ikki at fáa fatur á springarunum, tí teir hildu við tann spentar ál — ella við sjógv á baki — eystur í hav, greiðir vakthavandi á støðini í Havn frá.

**st**



*Savnsmynd*

# Eldur í við barnagarð

*Vildi illa til, so kundi eldur verið komin í Barnagarðin við Velbastaðvegin sunnunáttina. Eldur var í einum ruskílæti, men tíbetur fekk eldurin ikki fatur í klædningin*

Sveinur Tróndarson

Tað var um tvey tíðina sunnumorgunin, at alarmsentralurin fekk boð um, at eldur var í einum ruskílæti við Velbastaðvegin í Havn. Ruskílæti stendur við Barnagarðin við Velbastaðvegin, og vildi illa til, so festi eldurín í bygningin eisini.

So illa var nú kortini ikki statt. Tað eydnaðist at sløkkja eldin áðrenn, og tað var gott, tí sambært vakthavandi á støðini í Havn, so kundi stórskaði staðist av.

Sum skilst so er eldurin í ruskílætinum helst ásettur. Vakthavandi sigur, at tey hava frætt um 12 til 14 ára gomul ungfólk, sum hava verið í økinum beint frammanundan, men at tað kortini ikki hevur eydnast løgregluni at finna tey.

- Tí ber ikki til at siga, um tað eru tey ella ikki. Hinvegin kann talan eisini vera um, at onkur — av ósketni — hevur tveitt onkra glóð niður í ruskílæti, og so eru tað ikki tey ungu, sum hava ábyrgdina, sigur vakthavandi.

# Taska og frakki stolin

Leygarkvøldið varnaðist ein ung kvinna, at onkur hevði verið í so langfingraður móti henni.

Hon var saman við nógvum øðrum til veitslu í ítróttarhøllini á Hálsi, tá hon brádliga varnaðist, at onkur var farin avstað við frakkanum og taskuni.

Um tað er av tilvild ella tað er við fríum vilja, skal vera ósagt, men í fyrsta umfari hevur kvinnan boðað løgregluni frá í teirri vón, at fáa frakka og tasku aftur.

## Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

**Blaðleiðslan**

Minningarorð

# Lydia Johannesen

**f. 04.02.1943 - d. 07.09.2000**



Ja, dáttligt komu boðini hósdagin tann 07. sept., at tú góða Lydia ikki vart ímillum okkum longur.

»Best sum sólin fagrast skínur, deyðin inn um dyrnar trínur.« Ja, sannleikan í hesum orðum mugu vit ásanna enn einaferð. Lítið vardi tað meg, at vit sóust fyri síðstu ferð, tann dagin á keiini, tá ið Vesturvón kom heim av fiskiskapi.

Siti og hugsi um teg, og tankarnir leita aftur í tíðina til barnaárini, har vit sum smágentur leiktu við barnsins lætta lyndi. Tíðin var okkara, lívið ljóst og lætt fyri framman. Vit gjørdust tilkomnar, blivu giftar, fingu børn. Ja, tíðin rennur sum streymur í á. Árini gingu, børnini vuksu, fóru hvør í sína ætt.

Góða Lydia, tú vart ein góð kona og mamma. Tú gekst høgt uppí børnini, tey vóru títt eitt og alt. Tú fjálgaði um heimið og altíð vart tú blíð at koma inn til. Altíð vart tú tilreiðar at rætta eina hjálpandi hond og tað mundu vera fáar konfirmatiónir tú ikki vart biðin at kóka tínar vælumtóktu kleynir.

Gott var vinalagið og samanhaldið millum okkum konurnar »niðri í Stretinum«.Tíðin var ein onnur. Vit vitjaðu ofta hvørja aðra, sótu við stokkum, fóru túrar við børnunum. Óteljandi ferðir vóru vit við teimum á seiðabergi.

Ja mong og rík eru minnini.

Ymiskt er sum lagnutráðurin verður spunnin. Bert 57 ára gomul varð tú kalla heim til Harran. Títt lívsljós var niðurbrunnið.

Góði Christian, Tommy, Torfinn, Christly og Tony-Heri. Stórur er saknurin, tit hava mist eina góða konu og mammu. Eg havi djúpa samkenslu við tykkum. Eg hugsi nógv um tykkum í hesu sváru tíð.

Svárt má tað eisini vera hjá tær, Siggi-Mia, tí Lydia var tín eygnasteinur.

Má harrin styrkja tykkum í sorgini.

Góða Lydia, tú verður ikki gloymd, men í hjartanum væl goymd

**Vinkona tín Kristina**

*Orsakað av prentvillum, prenta vit hesi minningarorð umaftur. Blaðstjórnin*



ANSIÐ VÆL EFTIR HESUM MONNUNUM



MÁNADAGIN 14/10 FARA TEIR AT FREMJA STØRSTA MILLIÓNKVETTI Í FØROYA SØGU Á STARAVEGI 5 Í HAVN

Nøvnini á monnunum eru Jarnhold Nattestad og Vinjard Johansen.
Teir eru siðst sæddir á Staravegi 5. Har fara teir sum høvuðsmenn at leggja lunnar undir Føroya størsta hvítvøruhandil.
Konkurrentarnir eru í døpurhuga um ætlan teirra.
Vápnini, teir nýta, eru:

- **Føroya størsta úrval av hvítvørum**
- **Føroya lægstu hvítvøruprísir**

Møtið stundisliga leygardagin 14/10 kl. 9.00
á Staravegi 5, tá Jarnhold og Vinjard fara til verka!




Elkeyp

STARAVEGUR 5 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 31 49 50



Sosialurin - 311820